


– Tann kvalifiseraði kritikkurin av átrúnaði er ógvuliga rárur. Og tað er sera langt ímillum, at nakar beinleiðis grundgevur fyri gudloysi í almenna kjakinum. Samstundis er hin vongurin dagliga sjónligur í almenna rúminum, sigur tann 74 ára gamli Guttormur Djurhuus, sum seinastu tvey árini hevur týtt fýra religiónskritiskar bøkur til føroyskt, sum allar eru komnar út í ár

MYND: JENS KRISTIAN VANG

Tað blívur mangan líka sekteriskt sum tær kristnu rørslurnar. Eg havi altíð agerað sum einstaklingur, og tað fari eg at halda fram við, sigur Guttormur Djurhuus.

### Lívið uttan gud

Guttormur heldur, at fyribrigdið »átrúnaður« skal fatast í einum evolutionerum, darwinistiskum samanhangi. Átrúnaðurin hevur søguliga havt eitt »yvirlivilsispotentialið«, sum Guttormur málber seg, tí hann hevur nøktað nakrar grundleggjandi tørvir hjá menniskjanum. Munurin á einum gudsavnoktara og einum trúgvandi er sambært Guttormi, at tann fyrri góðtekur eitt lív uttan svar, og tað ger tann seinni ikki. Tí finst átrúnaðurin framvegis. Og tí skal hann handfarast við virðing.

– Eg hoyri als ikki til tey, sum halda, at átrúnaðurin er rótin til alt ónt. Átrúnaður kann saktans vera meinaleysur. Men tá tað er sagt, so hevur átrúnaðurin havt ómetaliga góð evni til at kontrollera og enntá kúga menniskju, heldur Guttormur.

Ein sterk ákæra, sum krevur útgreining. Nær verður átrúnaðurin kúgandi?

– Fyri tað fyrsta skapar religiónin ótta hjá tí einstaka menniskjanum. Ótta fyri syndini og dóminum, sum er so sentralt í kristindóminum. Eg skilji væl, at kristin menniskju eru bebbarædd fyri deyðanum. Tað hevði eg eisini verið, um eg var kristin, heldur Guttormur.

Men ert tú ikki sjálvur bangin fyri deyðanum?

Nei, als ikki. Hví skuldi eg tað?, spyr Guttormur, áðrenn hann heldur fram.

– Fyri tað næsta blívur religiónin ein trupulleiki fyri medmenniskjuni og umstøðurnar, tá hon verður intolerant.

> Tey flestu hava sjálvandi hoyrt um ateistisku lívsáskoðanina. Men tey hava ongantíð hoyrt nakran systematiskan kritikk av átrúnaði. Og tað hevur verið ein drívmegi í mínum arbeiði at týða

Tá hon roynir at kontrollera sínar umstøður. Tá hon trokar seg fram uttan at vera boðin. Tá hon gerst ein dagligur partur av lívinum hjá teimum, sum ongantíð hava bjóðað henni vælkomnari, sigur Guttormur.

Hann er líkasælur yvir fyri átrúnaði, sum virðir øðrvísi hugsandi menniskju. Sum virðir tann frælsa viljan og er opin yvir fyri øllum kritikki. Men trupulleikin er, at átrúnaður so mangan fær eitt intolerant andlit, og at verðin verður svørt og hvít.

– Tá er so nógv betri at liva uttan hugmyndina um ein gud. Og eg eri eitt livandi dømi um, at lívið kann vera deiligt uttan tey svarini, sum kristin halda seg hava fingið við teirra trúgv. Lívið er í roynd og veru deiligt uttan gud, sigur Guttormur og siterar franska heimspekingin René Descartes, sum segði, at um valið stóð ímillum eina hond, sum hevði svarini, og eina hond, sum hevði spurningarnar, so hevði hann til eina og hvørja tíð valt spurningarnar.

– Eg eri tíbetur føddur forvitin, og sum forvitið menniskja í einum gátuførum heimi er lívið ótrúliga spennandi, heldur Guttormur fyri.

### Sterkari kjakmentan

Guttormur Djurhuus vónar, at tær fýra bøkurnar, sum nú fyriliggja á føroyskum, kunnu vera eitt ískoyti til tað áhaldandi virðiskjakið um trúgv, vísindi og samfelag. Og hann vónar, at bøkurnar kunnu styrkja eina kjakmentan, sum eftir hansara tykki hevur lyndi til at tiga um teir eymu spurningarnar, sum skilja okkum sundur.

– Viðvíkjandi kjakinum um átrúnað, so eru vit føroyingar væl aftanfyri restini av norðurlondum, sum hava eitt øgiliga frítt kjak um átrúnaðarligar spurningar og leiklutin hjá átrúnaði úti í samfelagnum. Vónandi kunnu týddu bøkurnar stimbra til eitt betri og meiri kvalifiserað kjak, endar Guttormur Djurhuus.

### TÝDDU BØKURNAR:

***Trúgv og vantrúgv***. Ein bók um stríðið ímillum trúgv, vantrúgv og vitan. Eftir Christer Sturmark. Upprunaútgáva frá 2007.

***Lýtaleysa skapanarverkið og lívsins sorgarleikur***. Eftir Georg Klein. Upprunaútgáva frá 2005.

***Sjálvsævisøga*** – Charles Darwin. Upprunaútgáva frá 1958.

***Vilst vit***. Ein bók um at hugsa. Eftir Olav Hammer. Upprunaútgáva frá 2004.